Tjóðskjalasavnið

# PAKKING OG MERKING

**Pakking**
Tá skjøl verða løgd á fjargoymslu verða tey pakkað og merkt á slíkan hátt, at ikki er neyðugt at gera hetta av nýggjum, tá tey verða latin Tjóðskjalasavninum.

Skjøl, ið kunnu vrakast aftaná ávísa tíð verða pakkað fyri seg og merkt á skynsaman hátt (upplýsingar um innihald og ár). Stavurin "V" verður skrivaður við reyðum á eskju ella merkiseðil saman við tí árstali, ið sigur nær skjølini kunnu beinast burtur.

Skjøl, ið skulu varðveitast og seinni latast Tjóðskjalasavninum verða pakkað og merkt sambært niðanfyri standandi:

**Savnseskjur**
Skjølini verða pakkað í serstakar savnseskjur, ið eru ætlaðar til endamálið. Hesar nevnast ”Rigsarkivet model”. Hvør eskja er í tveimum, ein botnur og eitt lok. Tá tær verða keyptar eru tær ikki settar saman og krevja tí lítið goymslupláss.

Eina langa síðan av botninum er klaffur, ið kann bendast, so lætt er taka tilfar úr ella leggja í eskjuna. Tá tilfar verður lagt í eskjuna skal klaffurin vera vinstru megin. Eskjan skal fyllast heilt, men má to ikki ovurfyllast.

**Bílegging/keyp**
Savnseskjur fáast í ymsum støddum:

| Navn | Stødd á botni innan |
|---|---|
| A4 | 315 x 235 x 80 mm |
| Lítil folio | 350 x 225 x 80 mm |
| Millumfolio | 360 x 235 x 80 mm |
| Stór folio | 380 x 250 x 80 mm |

**NB:**
Tað mugu ikki nýtast eskjur, ið eru størri enn sjálv skjølini, tá hetta kann skaða tey.
Málini verða løgd í eskjuna við við rygginum móti leysa klaffanum. Eskjurnar verða fyltar, men mugu ikki ovurfyllast. Heldur ikki má verða fylt ov lítið í tær.

**Málsumsløg**
Støddin á málsumsløgum skal vera tann sama sum á pappírunum í sjálvum málunum. Málsumsløg verða nýtt at leggja um pappír, skjøl o.a., ið hoyra saman, nýtt til skilja sundur ymisk sløg av savnindum, at skilja ymsar árgangir o.l. Á málsumslagi skal vera ásett stovnsnavn (um neyðugt eisini deildarnavn), journalheiti og árstal.

Um gomul málsumsløg eru størri í vavi enn sjálv málini, eiga hesi, í sambandi við pakking í savnseskjur, at verða skorin soleiðis at støddin verður tann sama sum á sjálvum málunum. Ansast

skal eftir, at einki, ið er skrivað á umsløgini hvørvur. Hetta merkir, at tað er ikki støddin á málsumsløgunum, men sjálv málini, ið avgera hvørja stødd av savnseskjum ein nýtir.

**Kartotekskort**
Kartotekskort verða pakkað í og avhend í serstøkum fipureskjum (kartotekseskjum), ið eru ætlaðar til endamálið. Innara málið í eskjuni má ikki vera størri enn 25 cm. Eskjurnar fáast hjá flest øllum bókhandlum.

Kartotekskort í A4-stødd verða pakkað í savnseskjur.

Áðrenn kartotekskort verða avhend, skal kannast at tey liggja í rættari raðfylgju.

**Merking**
Í sambandi við avhending útvegar Tjóðskjalasavnið merkisðlar til savnseskjurnar.

Savnseskjur og protokollir verða settar í reol á sama hátt og bøkur. Merkiseðlanir verða tí settir á ryggin á protokollum um rúm er fyri tí og á longu og stuttu kantsíðuna á eskjum. Tá eskjan verður sett á hill, skal lokið vera til vinstru og botnurin til høgru. Niðari kantur á merkiseðlinum skal vera 1 cm upp frá niðara kanti á protokoll og/ella eskju.

Á smølum protokollum verður merkiseðilin settur ovast í vinstra horni á permuni - framman.
Á kartotekseskjum verður merkiseðil settur á fremru síðu.

Merkiseðlar verða límaðir á við vanligum trælími (PVA-lími). Ansast skal at seðilin ikki rukkast og at allir kantar verða límaðir væl og virðiliga. Ikki er loyvt at nýta sjálvklistrandi merkiseðlar.